


# Útferðin hjá 1. flokki tann 2. juni 2016

So er tíðin komin til, at vit í 1. flokki í skúlanum við Løgmannabreyt fara okkara fyrstu floksútferð uttan fyri Havnina.

Hósdagin tann **2. juni 2016** fara vit, saman við starvsfólkum frá frítíðarskúlanum, til **Kvívíkar**. Vit fara avstað sama, hvussu veðrið er. ☺

Vit **møta sum vanligt** í skúlanum kl. 8. Bussurin fer frá skúlanum við Løgmannabreyt kl. 8.15. Um tað er onkur, sum longu veit, at tað ikki liggur fyri at koma við nevnda dagin, vilja vit fegin fáa tað at vita sum skjótast, tí tað kann vera avgerðandi fyri, hvussu stóran buss vit skulu hava.

**Í Kvívík** fara vit at hugna okkum. Vit fara at vitja á skúlanum og frítíðarskúlanum í Kvívík, so vit kunnu síggja, hvussu teirra gerandisdagur er. Tað eru 50 næmingar á øllum skúlanum. Harafturat fara vit at ganga runt í bygdini, spæla í ánni, spæla ymisk spøl á økinum hjá skúlanum og svimja.

**At hava við:**

- Góðan og stóran matpakka (frítíðarskúlin skipar fyri millummála í Kvívík).
- Vatndunk
- Skiftiklæðir í einum plastposa, so alt ikki verður vátt og skitið. (Vit fara at spæla í ánni).
- Svimjiklæðir og handklæði.

Vit vera aftur á skúlanum á Løgmannabreyt kl. **15.30.** Tá eru foreldrini vælkomin at **avheinta børnini** eftir ein langan og vónandi góðan og stuttligan dag.

Vit gleða okkum at fara ein øðrvísi túr við tykkara børnum.

Vinarliga

Toymið í 1. flokki og starvsfólkini í frítíðarskúlanum



